


**TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL AUT STW** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KB 969 **Km:** 115.000
**Árgangur:** 14.10.04

**Kr. 225.000,-**




**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA SEDAN**

**Skrásetingarnr:** ML 188 **Km:** 104.000
**Árgangur:** 02.10.01

**Kr. 78.000,-**




**TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HV 385 **Km:** 47.000
**Árgangur:** 16.02.05

**Kr. 250.000,-**




**TOYOTA HI LUX 2,4 TD 4X4 XTRA CAB** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HU 844 **Km:** 140.000
**Árgangur:** 18.10.00

**Kr. 120.000,-**




**FORD FOCUS 1,6** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DF 187 **Km:** 49.000
**Árgangur:** 06.09.02

**Kr. 95.000,-**




**HYUNDAI ACCENT 1,3**

**Skrásetingarnr:** FE 473 **Km:** 51.000
**Árgangur:** 21.02.03

**Kr. 68.000,-**



**HYUNDAI SANTA-FE 2,0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GB 990 **Km:** 60.000
**Árgangur:** 01.02.02 **Seinast sýnaður:** 01.02.02

**Kr. 180.000,-**




**TOYOTA AVENSIS 2,0 D4-D TERRA SED** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BV 550 **Km:** 142.000
**Árgangur:** 01.11.00

**Kr. 118.000,-**




**TOYOTA COROLLA 2,0 LINEA TER. D-4D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TS 219 **Km:** 60.000
**Árgangur:** 21.02.03

**Kr. 148.000,-**



**MAZDA 6 1,8 SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DR 325 **Km:** 31.000
**Árgangur:** 04.05.05

**Kr. 190.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.


# Samráðingar um limaskap



*- Eitt av krøvunum, LOA-grunnurin setur til stuðul, er, at byggingin er nýskapandi í arkitekturi og nýtslu. Hetta er sera áhugavert og kann vera við til at lyfta byggilistarliga støðið á mentanarhúsum og ítróttaanleggum kring landið, heldur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Í løtuni verður bíðað eftir uppleggi frá LOA-grunninum, og eftir ætlan fara samráðingar um limskap í gongd í næstum, sigur landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni**

LOA-GRUNNURIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í síðstu viku høvdu vit samrøðu við Petur Elias Petersen, stjóra í føroysku ítróttarveddingini, um ein danskan grunn, sum kallast Lokale-og Anlægsfonden, róptur LOA-grunnurin.

Hetta er ein grunnur, sum árliga fær einar 80 miljónir krónur frá Danske Spil, har føroyska ítróttarveddingin stendur fyri einum parti av inngjaldinum í grunnin.

Tað, sum er áhugavert við hesum grunni, er, at hann veitir stuðul til mong ymisk nýskapandi endamál innan ítrótt, mentan og frítíðarvirksemi í breiðum høpi.

Ein og hvør kann ikki vera limur í grunninum og soleiðis fáa úr honum, men grunnurin góðtekur, at eitt nú Føroya landsstýri kann vera tilmeldað, eins og grønlendska heimastýrið longu er tilmeldað.

Síðan Grønland gjørdist limur, hevur LOA-grunnurin í sum skilst veitt meira stuðul til ymisk endamál í Grønlandi, enn landið hevur goldið í limagjaldi.

## Kanna møguleikarnar

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sigur, at Mentamálaráðið í eina tíð hevur arbeitt við at kanna møguleikarnar fyri føroyskum limaskapi í LOA-grunninum, sum eitt nú veitir stuðul til bygging av mentanarhúsum og ítróttaranleggum.

- LOA-grunnurin er áhugaverdur, tí føroyingar við limaskapi fáa møguleika at søkja um stuðul til verkætlanir, ið snúgva seg um bygging og innrætting av mentanarhúsum og ítróttaranleggum.

Jógvan á Lakjuni sigur, at føroyskur limaskapur í grunninum væntandi fer at kosta føroyingum umleið eina miljón krónur um árið í limagjaldi.

- Eitt av krøvunum, ið LOA-grunnurin setur til stuðul, er, at byggingin er nýskapandi í arkitekturi og nýtslu. Hetta er sera áhugavert og kann vera við til at lyfta byggilistarliga støðið á mentanarhúsum og ítróttaranleggum kring landið, heldur landsstýrismaðurin.

## Bíða eftir LOA

Í februar í ár var málið um limaskap fyri á landsstýrisfundi, og landsstýrismaðurin í mentamálum fekk tá heimild frá landsstýrinum til at fara undir samráðingar við LOA.

- Í løtuni verður bíðað eftir uppleggi frá LOA-grunninum, og eftir ætlan fara samráðingar um limskap í gongd í næstum. Tó má roknast við, at ein ávís tíð gongur, til ein avgerð um føroyskan limaskap fyriliggur, sigur landsstýrismaðurin.

Jógvan á Lakjuni heldur, at LOA-grunnurin er sera áhugaverdur fyri føroyingar.

- Vit fara avgjørt at troyta teir møguleikar, ið eru fyri føroyskum limaskapi, sigur landssýrismaður í mentamálum við Sosialin.